# Skrivstovufólk
## til Hjálparmiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild av Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um**
- vanligt skrivstovuarbeiði
- journalisering
- móttøku og telefonavgreiðslu

**Vit sóknast eftir einum starvsfelag sum hevur:**
- útbúgving innan skrivstovuyrki
- drúgvar royndir á økinum
- góð samstarvsevnir
- góðan telduførleika
- kunnleika til journalisering (DocuLive) er ein fyrimunur
- kunnleika til C5

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- samskifti við viðskiftafólk

Løn og stanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á tlf. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 22. januar 2002 kl. 14.00.

# Leiðari til útibarnagarð

Í samband við at Leirvíkar Kommuna er í ferð við at seta útibarnagarð á stovn, verður søkt eftir leiðara at byrja 1. februar 2002.

Vit søkja ein persón, ið dámar væl at verða úti í náttúruni, hevur eitt opið sinni og sær møguleikar fram um mørk.

Umsøkjarar við pedagogútbúgving hava fyrimun. Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 7. januar 2002 kl. 12.00**.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Almenn útbjóðing

At mála Miðvágs kirkju innan

Við hesum verða áhugaðir málarar bodnir at taka lut í almennari útbjóðing um at mála Miðvágs kirkju innan.
Arbeiðið er ætlað at fara fram í vikunum 6-11.
Útbjóðingartilfar fæst við at venda sær til undirritaða í seinasta lagi 10. januar 2002.

**Tummas Lauritsen, arkitektur**
**370 Miðvági**
**Tlf. 333033**
T-post: tummas@kallnet.fo

# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi at byrja 1. februar 2002 ella eftir nærri avtalu, 35/40 tímar um vikuna.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur við 3 stovum, 20 børn í hvørjari í aldrinum 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýrið.

Meiri fæst at vita við at ringja til leiðaran Elsebet Bolstad á tlf. 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 18.1.2001.

**Barnagarðurin á Konsmansmýru**

# Frá Eysturoyar Javnaðarfelag

1. uppstillingarfundur verður mikudagin 23/1.
Lýst verður nærri um tíð og stað.

**Nevndin**

# Fólk søkist

Fólk søkist til at standa í sølubúðini umborð á Ternuni um Vestmannasund.
Møguleiki er fyri at arbeiða 1 viku og hava eina viku frí fyri fasta løn.
Løn sambært avtalu.
Áhugaði kunnu ringja á **tlf. 211099** ella **361299**.

# Kømur til leigu

6 kømur í Vesturbýnum til leigu.

**Bill.mrk. 2502**

# Tiltøk í januar 2002

**Sunnudagur 06. kl. 16.00**
Nýggjárskonsertin 2001 v/ Føroya Symfoniorkestri og einum nýggjárskóri.
Hetta er eykakonsert

**Sunnudagur 06. kl. 19.30**
Nýggjárskonsertin 2001 v/ Føroya Symfoniorkestri og einum nýggjárskóri.
(Dyrnar verða læstar kl. 19.00).

**Mánadagur 07. kl. 19.30**
KLIPP, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir svenska filmin frá 2000 Jalla!Jalla!
Leikstjóri er: Josef Fares.
Filmurin snýr seg um teir báðar vinmenninar Måns og Roro og lív teirra

**Mikudagur 09. kl. 19.30**
Norrøna Felagið heldur fund. Fyrilestur við Niels á Velbastað undir heitinum:
"Alment norðurlendskt samstarv í "fimmti ár"

**Fríggjadagur 11. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur
v/ Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 12. kl. 14.00**
Málningaframsýningin hjá Bjarna Sigurbjørnsson, Ísland, letur upp

**Leygardagur 12. kl. 19.30**
Konsert við bólkunum Hatespeech, 200, Týr, Mold.
Fyriskipari er TUTL. Hetta er í sambandi við TUTL 25 ár

**Fríggjadagur 18. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur v/ Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 19. kl. 14.00**
Framsýningin Farven og Lyset hjá Lone Schmidt, Danmark, letur upp

**Mikudagur 23. kl. 19.30**
Norrøna Felagið heldur fund. Fyrilestur um føroyskan dans við Eyðun Andreassen, professara. Aftaná verður farið upp á gólv.

**Hósdagur 24. kl. 19.30**
Vetrarjazzur. Eero Koivistoinen Projekt, Finnland, spælir saman við føroyskum tónleikarum

**Fríggjadagur 25 kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur
v/ Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 26. kl. 15.00**
Framførsla í sambandi við at Dansifrøi er 25 ár
Eisini verður framsýning av gomlum myndum í forhøllini

**Mikudagur 30. kl.19.30**
Foreldrafelagið í Havn heldur almennan fund

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650



# SKEIÐ Í RESIRKULERING

Fiskivinnuskúlin skipar fyri skeiði í resirkulering á Hotel Føroyum tann 21 og 22 januar 2002. Har pláss er fyri 20 luttakarum.

**Málbólkur:** Starvsfólk á smoltstøðum, sum nýta skipanir við resirkulering

**Fortreytir:** Tað er ein fyrimunur, um skeiðsluttakarar hava arbeitt við skipanum við resirkulering, men tað er ongin treyt.

**Undirvísarar:** Silvin Rasmussen og Magnus Pauli Magnussen

**Skipan:** Skeiðini verða skipað sum vistarskeið á Hotel Føroyum í Havn

**Skeiðskostnaður:** Kr. 4.250 við gisting og kr. 4.000 uttan gisting (verður kravt inn undan skeiðnum)

**Undirvíst verður m.a. um:**
Evnafrøðiliga bakgrund í samband við resirkulering. Um vatngóðsku, vatnmátingar og vatnmátingarhættir, um reinsing og reinsieindir, heildarloysnir, um rakstur á smoltstøð og eftirmetingar av mátingum á smoltstøð. Fullfíggjað skrá er at finna á heimasíðuni hjá Fiskivinnuskúlanum: www.fiskvest.fo

Seinasta freist fyri tilmelding er týsdagin **10.januar 2002**. Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 31 60 19. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 31 75 00 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðini eru treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73, fax 42 44 28
T-postur: fiskvest@fiskvest.fo
www.fiskvest.fo

✂

**Innskrivingarseðil til skeið í resirkulering**

**við gisting** ☐

**uttan gisting** ☐

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur | Gjaldari: |

# Dagrøktin í Leirvík

søkir eftir dagrøktara í fyribils 3 mánaðar.
Og einum fólki at ansa eftir børnum í spælistovuni.

Størvini eru lønt sambært sáttmálanum ímillum FKA og FA.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 443251.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2002.

**Dagrøktarskipanin í Leirvík**
Postrúm 42
520 Leirvík

Broytingar

# Bygdaleiðir í Suðuroy

***Hesar broytingar eru galdandi frá leygardegi 5. januar 2002***

**Leið 700 Vágur - Tvøroyri**

Koyrt verður fyrsta túr á morgni upp á tilkalling til Porkeri og Hov. Tilkalling er á tlf 37 05 52, 21 35 52 ella 37 36 47

Túrurin úr Vági leygardag kl 12:15 er fluttur til kl 10:40

**Leið 704 Sumba - Vág**

Túrarnir úr Sumba leygardag og sunnudag kl 11:45 eru fluttir til kl 10:20

**Leið 704 Vágur - Sumba**

Túrarnir úr Vági leygardag og sunnudag kl 16:30 eru fluttir til kl 18:00

Í Sumba verður koyrt til og frá Ólafløtti

Alla aðrar leiðir sigla og koyra eftir galdandi ferðaætlan frá ***1. november 2000.*** Nýggj ferðaætlan kemur í gildi 1. apríl 2002

Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Almennir fundir

hjá Skála Bygdaráð í 2002 verða hesar mikudagar kl. 19.00:

| | |
|---|---|
| 30. januar | 28. august |
| 27. februar | 25. september |
| 27. mars | 30. oktober |
| 24. apríl | 27. november |
| 29. mai | 18. desember |
| 26. juni | |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Skála Bygdaráð**

KIRKJUBØAR KOMMUNA

# Kunngerð

**Almennir fundir hjá Kirkjubøar kommunu í 2002 eru hesar hósdagar:**

| | |
|---|---|
| 24. januar | 05. september |
| 21. februar | 03. oktober |
| 21. mars | 31. oktober |
| 18. apríl | 21. november |
| 16. mai | 12. desember |
| 20. juni | |

Allir fundirnir byrja kl. 16.30 í Sólarmagn. Møguligar broytingar og eykafundir verða lýstir í svørtutalvunum í Kirkjubø og á Velbastað.

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 7 dagar áðrenn fundin.

**Frá 2. januar í 2002 verður kommunuskrivstovan opin hesar týsdagar frá kl. 13.00-16.00.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29. jan. | 23. apríl | 03. sept. | 26. nov. |
| 26. febr. | 28. mai | 24. sept. | 17. des. |
| 26. mars | 25. juni | 29. okt. | |

**Kirkjubøar kommuna**